## Flindt-Bjerg er hetja

Fyrrverandi KÍ-venjarin Ove Flindt-Bjerg er hetja í norska felagnum Odd Grenland, eftir at tað við trimum sigrum á rað eydnaðist felagnum at sleppa undan beinleiðis niðurflyting til næstbestu deildina. Síðsta umfar varð spælt í norsku tippuliguni leygardagin, og Odd Grenland vann sín dyst 2-0. Neyðugt var, at Start eisini skuldu tapa, og tað gjørdu teir. Hetta hevur við sær, at Start flytir niður, og Odd Grenland skal nú spæla uppflytingardyst ímóti Bodø/Glimt úr næstbestu deildini. Norskir fjølmiðlar skriva, at Ove Flindt-Bjerg ikki hevur gjørt upp við seg sjálvan, um hann vil halda fram sum venjari í norska felagnum. Hann skal svara felagnum í dag.



Kyndil-VB 18-20 (11-11):

# Mál skulu til

**Tá Kyndil bert skoraði trý mál seinastu 23 minuttirnar kundu VB-kvinnurnar fara suður við báðum stigunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tordis Tróndarson spælir í ár við Kyndli. Men saman við liðfeløgunum mátti hon síggja VB fara avstað við stigunum sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ofta hevur verið tikið til um VB-kvinnurnar seinnu árini, at avrikini púrasta eru tengd at spælinum hjá Daivu Toumaite.

At siga, at Daiva ikki var ein týðandi spælari sunnudagin, vildi nokk verið ein lygn. Men týdningurin av sterka litavanum var ikki eins sjónligur hesaferð, sum hon onkra tíð hevur verið.

Og tí gjørdist talan fyri tað nógva um eina sera javna uppgerð sunnudagin. Kyndil ansaði støðugt eftir, at Daiva ikki slapp framat alt ov nógvum skotroyndum, og tá Guðrun í Lágabø so fyri tað mesta stóð sera væl í málinum, varð VB hildið í stuttum tjóðuri.

Hinvegin var ilt at síggja nakað veruliga skipað spæl hjá Kyndli. Alt ov ofta vórðu bóltar tveittir burtur, men eina løtu eftir steðgin tóktist veruliga at bragda. Frá javnleiki í hálvleikinum lupu vertirnir trý mál framum, og so ráddi um at halda fast um leiðsluna. Nakað sum tær grønu tó ikki megnaðu.

Onkur áskoðari tók til, at hetta ikki var ein dystur, sum VB vann, men heldur ein, sum Kyndil tapti, og nakað er helst um tað. Seinastu 23 minuttirnar skutu tær grønu nevnliga bert trý mál. Og við hópin av mistøkum syrgdu tær støðugt fyri, at VB kundi hótta við kontra-álopum.

Og tá Asta Armonavicute so eisini lyfti sítt spæl heilt nógv, steðgaði Kyndil fullkomuliga, og tí bildi tað einki hjá VB, at eisini tær steðgaðu upp. Soleiðis fingu tær bert tvey mál seinasta korterið, tá Daiva eisini varð mansvard fyri tað nógva. Men uttan mál frá Kyndli gjørdi hetta ikki tað heilt stóra.

**FAKTA**

**Kyndil-VB 20-18 (11-11)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Lina Andriulyta 6, Súsanna Petersen 4, Tordis Tróndarson 4, Jórun Ludvig 2(1), Jacklyn Durhuus 2
**VB:** Daiva Toumaite 7, Svava Vestergaard 4, Laila Jespersen 3, Monika Samuelsen 2, Bára Mortensen 1, Siri Gudmundsson 1, Miriam Michelsen 1, Theresa Joensen 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, VB 1
**Útvísingar:** Kyndil 3, VB 2
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen.

## Sigursrøðin varð steðgað

Fremad Amager tapti um vikuskiftið í triðbestu donsku fótbóltsdeildini. Annar hevur gingið strúkandi hjá føroyska felagnum í danska høvuðsstaðnum, og Fremad Amager liggur eisini á odda í 2. Deild Eystur. Um vikuskiftið var FC Roskilde mótstøðuliðið, og Roskilde vann uppiborið 2-1. Teir úr Roskilde skoraðu tvey tey fyrstu málini, og teir hildu fast um leiðsluna, hóast Fremad Amager minkaði um munin í seinna hálvleiki.

(Mynd: Laudrup)

## Laudrup vann aftur

Getafe, har danin Michael Laudrup er venjari, vann aftur um vikuskiftið. Sunnukvøldið spældi Getafe á útivølli ímóti Osasuna, og Getafe vann dystin 2-0. Annars hevur ikki gingið nakað serligt hjá Getafe, og Michael Laudrup hevur verið undir trýsti seinastu vikurnar. Nú fingu bæði hann og liðið hjá honum eitt sindur av luft.

VÍF-Stjørnan 19-28 (5-16):

# Ivaleyst oddalið

**Stjørnan styrkti um oddastøðuna, tá tær vunnu sera trygt í Vestmanna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Har var eingin ivi, tá oddaliðið úr Stjørnuni var á vitjan hjá VÍF sunnudagin. Frá byrjan vístu gestirnir seg sum sterkara liðið, og VÍF hevði sera ilt við at gera nakað sum helst við meistararnar. Fyrsta korterið megnaðu tær gulu tó so dánt at fylgja við, men so skrædnaði av álvara. VÍF vann seinasta korterið av fyrra hálvleiki við 8-1, og so var munurin vorðin somikið stórur, at spenningurin var fullkomuliga horvin.

Seinastu 30 minuttirnir gjørdust tí meira ella minni ein avgreiðsluspurningur hjá gestunum, sum als ongar trupulleikar høvdu við at halda fast um fjarstøðuna.

Sigurin ber við sær, at Stjørnan styrkti um sína støðu í oddinum, tó at Neistin í løtuni hevur tveir dystir tilgóðar, og soleiðis kann koma ájavnt Stjørnuni í stigum.

VÍF er saman við Kyndli og StÍF á niðastu sessunum í deildini.

**FAKTA**

**VÍF-Stjørnan 19-28 (5-16)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rapa 7, Rannvá á Rógvi 3, Lillian Djurhuus 3, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Heidi Joensen 2, Marita Johansen 1, Fríða Marjunardóttir 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 12(4), Joan Midjord Djordjevic 5, Durita Christophersen 4, Hanna Mikkelsen 2, Anna Kristina Samson 2, Ella Petersen 1, Edith Hansen 1, Una Olsen 1
**Brotskøst:** VÍF 2, Sjtørnan 5
**Útvísingar:** VÍF 6, Stjørnan 4
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen